

Føroya Banki søkir nýggj starvsfólk:

# VIT VILJA SKAPA FRAMBURÐ – VILT TÚ?

**Føroya Banki slóðar fyri øktum dynamikki í føroyska samfelagnum, tí vit vilja skapa framburð. Vit arbeiða eftir eini miðvísari vakstrarætlan á øllum trimum virkisøkjum bankans, privat, vinna og íløgur. Nógv mál eru rokkin, og vit seta okkum støðugt hægri mál. Í okkara vinnu eru starvsfólkini ein tann týdningarmiklasta fortreytin fyri framhaldandi framburði. Vilt tú vera við til at skapa framburð?**

## Íløguráðgevi

Fuji, Microsoft og Nokia. Lánsbrøv við fastari rentu og lánsbrøv knýtt at vísitølum. Íløguprógv við breiðari spjaðing og íløguprógv við stórari fokusering. Nógvir eru íløgumøguleikarnir, og stór eru krøvini til vitan. Okkara vitan er kundans trygd. Hevur tú kunnleika til virðisbrøv og eina hóskandi útbúgving á økinum, ert tú kanska okkara nýggi íløguráðgevi á Íløgudeildini.

Tú fert at arbeiða í einum toymi við dugnaligum og virkisfýsnum starvsfeløgum, ið eldhugað arbeiða fyri at skapa góð úrslit fyri bankan og kundarnar. Vit vænta, at tú saman við teimum vilt gera títt besta fyri at varðveita verandi kundar og draga nýggjar at bankanum.

**Førleikakrøv:**
Tú hevur eina búskaparfrøðiliga útbúgving av hægri lærustovni. Somuleiðis hevur tú góð evnir at samskifta. Tú skalt bæði kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera ein góður toymisleikari.

## Verkætlanarfólk

Nýskapan og menning eru lyklaorðini til vøkstur. Menningarvirksemi bankans er ógvuliga týdningarmikið fyri okkum, tí vit skulu altíð vera fyrsta val hjá viðskiftafólkunum. Vit hava nú brúk fyri einum verkætlanarfólki aftrat til Menning & Samskifti.

Hevur tú visjónir fyri, hvussu bankin kann mennast, og mót uppá at fremja visjónirnar í verki, leita vit kanska júst eftir tær. Tú skalt kunna arbeiða sjálvstøðugt og samstundis vera ein góður viðleikari í toyminum. Kreativitetur og skipanarevni verða sett í hásæti. Á deild okkara fyri menning fert tú at arbeiða í einum góðum fakligum umhvørvi.

**Førleikakrøv:**
Tú hevur eina hóskandi útbúgving av hægri lærustovni sum búskaparfrøðingur ella líknandi, og helst hevur tú eisini royndir at leiða verkætlanir. Royndir úr fíggjarheiminum telja eisini, men tær eru ikki nakað krav.

## HR-Mennari

Teambuilding og coaching eru lyklaorð í einari og hvørjari nútímans tænastufyritøku, har starvsfólkini eru avgerandi fyri, hvussu gott tænastustøðið og tí eisini kappingarførið er.

Fyri at styrkja um áhaldandi menningina av bankanum arbeiða vit miðvíst við at gera starvsfólk okkara uppaftur dugnaligari. Vit sóknast nú eftir einum HR-Mennara til Starvsfólkadeildina at skipa og menna hetta týdningarmikla økið fyri bankan.

Tú fert at fremja hetta í tøttum samstarvi við hini starvsfólkini á Starvsfólkadeildini. Somuleiðis hevur tú møguleika at brúka góða samstarvsnet bankans uttan fyri oyggjarnar at fáa til vega nøktandi vitan og skipanir at loysa uppgávuna.

**Førleikakrøv:**
Tú hevur eina hóskandi útbúgving og hollar royndir at arbeiða við fólki. Sjálvt tær tungu samrøðurnar fella tær lætt at skipa. Tú skalt hava dirvi at siga tína hjartans meining.

**Løn og setanarviðurskiftir:**
Verður avtalað nærri samsvarandi útbúgving og royndum umsøkjarans.

**Umsókn:**
Send tína umsókn við CV og prógvum til: Føroya Banki, Húsagøta 3, FO-100 Tórshavn, att: Bjarki Mohr, ella á teldupost starvsfolk@foroyabanki.fo áðrenn mánadagin 24. august 2006.

**Spurningar:**
Spurningar um starvið sum verkætlanarfólk kunnu setast Johnny í Grótinum, leiðara á Menning & Samskifti, á tlf 31 13 50. Spurningar um starvið sum íløguráðgevi kunnu setast Jan Jakobsen, leiðara á Fíggjardeildini, á tlf 31 13 50 ella til Bjarka Mohr, starvsfólkaleiðara, á tlf 31 99 37 ella á teldupósti bjarki.mohr@foroyabanki.fo, sum eisini svarar spurningum um starvið sum HR-Mennari.

FØROYA BANKI
100 ár – yngri enn nakrantíð

REPROZ